# Norðhavssildin mennist triðja árið á rað í føroyskum sjógvi



- Sildin stóð mest sum í øllum tí kannaða økinum, har sjógvurin var kaldari enn 5 stig í vatnsskorpuni, sigur

**Kanningarnar, sum Magnus Heinason hevur gjørt, eru liður í altjóða kanningum av norðhavssild og svartkjafti í Norðuratlantshavi. Hesar kanningar eru skipaðar undir ICES og verða róptar: "Planning Group on Northeast Atlantic Pelagic Ecosystem Surweys", stytt PGNAPES**

KANNINGARFERÐ
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Havrannsóknarskipið, Magnus Heinason, er júst komin aftur av silda -og svartkjaftakanningum norðanfyri.

Í stuttum er niðurstøðan hon, at nógv var at síggja av norðhavssild norðanfyri, væl meira enn í fjør. Hinvegin var minni at síggja av svartkjafti.

Hetta er soleiðis triðja árið á rað, at nøgdin av norðhavssild veksur í føroyskum sjógvi.

Tað var Jan Arge Jacobsen, sum hevði ábyrgdina av kanningunum hesaferð, og við fyri Fiskirannsóknarstovuna á túrinum hjá Magnusi Heinason vóru umfram Jan, eisini Leon Smith, Mourits Mohr Joensen og Arnold Hendriksen.

Kanningarnar, sum Magnus Heinason hevur gjørt, eru liður í altjóða kanningum av norðhavssild og svartkjafti í Norðuratlantshavi. Hesar kanningar eru skipaðar undir ICES og verða róptar: "Planning Group on Northeast Atlantic Pelagic Ecosystem Surweys", stytt PGNAPES, har Føroyar, Noreg, ES, Rusland og Ísland luttaka.

Endamálið er at kanna nøgdirnar av sild og svartkjafti í føroyskum øki norðanfyri.

## Altjóða kanning

Umfram Magnus Heinason, vóru eisini onnur havrannsóknarskip úr londunum, sum eru við í PGNAPES, við í kanningunum.

Kanningarferðin byrjaði í ein útnyrðing úr Føroyum, og síðan sigldu skipini eystur og vestur-kósir norðureftir – við 30 fjórðingum millum hvørja kós.

- Túrurin gekst væl, og veðrið var gott ein stóran part av túrinum. Hetta ger, at ekkókanningarnar verða meira álítandi enn, tá ið nógv rok er í sjónum, sigur Jan Arge Jacobsen, sum hevur skrivað eina frágreiðing um kanningarferðina.

Í frágreiðingini vísir hann á, at nøgdin av sild og svartkjafti verður mátað við ekkoloddi, og talt verður saman við einum sonevndum ekkóintegratori.

Í slíkum kanningum verður trolið eisini koyrt út fyri líkasum at staðfesta, hvat tað er fyri ein fiskur, ið sæst á loddinum.

- Síðan verða upplýsingarnar umroknaðar til tons av fiski. Samlaða nøgdin av sild og svartkjafti verður roknað út á fundi í Reykjavík seinni í summar, tá ið tølini hjá øllum skipunum, sum vóru við í kanningini, eru tøk, sigur hann.

Kanningarnar av krill verða gjørdar við plankton glúpi, eins og hita-og saltmátingar eisini verða gjørdar á einum slíkum túri.

## Nógv sild

Jan Arge Jacobsen sigur, at nógv sild var at síggja í føroyskum øki norðanfyri og beint vestur frá íslendska markinum norðanfyri.

- Sildin stóð mest sum í øllum tí kannaða økinum, har sjógvurin var kaldari enn 5 stig í vatnsskorpuni. Í dýpinum millum 200-250 metrar, har sildin stóð um dagin, var kaldari. Sildin kom upp seint um kvøldið, heilt upp undir vatnsskorpuna. Tá spjaddist hon og tók seg ikki saman aftur fyrr enn út á dagin eftir.

Miðallongdin á norðhavssildini var um 34 cm., og miðalvektin var 281 gram.

- Sildin var heldur rak enn, sigur Jan Arge Jacobsen.

## Minni svartkjaftur

Á kanningarferðini við Magnus Heinasyni varð staðfest, at heldur minni av svartkjafti var at síggja norðanfyri í ár – og úti á opnum havi var mest

# Fígging til gransking

**P/F Vónin, sum er eitt av heimsins størstu virkjum av sínum slagi, hevur fingið fígging til at seta fólk í starv, sum burtur av skal granska í flótitrolum**

GRANSKING
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo



*Neyðugt er at granska, um menningin skal halda fram*
*Mynd: Mourits Mohr Joensen*

Føroyska trolvirkið, Vónin, víðkar áhaldandi um sítt virksemi úti í heimi, og tað seinasta nýggja, er, at felagið hevur keypt seg inn í virkir í Grønlandi.

Eitt felag, sum arbeiðir við trolreiðskapi, hevur fyri neyðini at mennast - og mennast støðugt.

Sum ein liður í hesi menning, hevur P/F Vónin fingið fígging til at seta eitt fólk í trý ár burtur av til at granska í flótitrolum.

Ætlanin er fingin í lag saman við Fiskirannsóknarstovuni og Fróðskaparsetri Føroya.

Lýst verður nú eftir fólki til hetta starv. Talan er um Ph.D.-lestur, sum verður samskipaður við universitet uttanlands.

Føroyska trolvirkið Vónin telist millum heimsins størstu virkir av sínum slagi.

# Tunnilsfundur í S

**Samljóð í Skopun verður fríggjadagin 19.05.06 karmur um søguligan og forvitnisligan fund. Tá seta sandoyingar undirsjóvartunnil til Sandoynna á breddan og serkønir á økinum halda fyrilestrar og tosað verður um fyrimunir og vansar við slíkum tunnli**

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Dagfinn Olsen*
dagfinn@sosialurin.fo

Samljóð í Skopun verður fríggjadagin klokkan 19.00 karmur um søguligan og forvitnisligan fund.

Í samband við at arbeitt verður, við at fáa undirsjóartunnil til Sandoynna, hevur ein fyribils tunnilsnevnd, sum er skipað av teimum politisku valfeløgunum í Sandoyar sýslu, tikið stig til ein kunnandi fund í Samljóð í Skopun.

Nevndin hevur kunnað Suðuroyar Vinnuráð, og aðrar persónar har, um tað sum arbeitt hevur verið við og fingið teir við í málið. Nevndin hevur møtt stórari vælvild frá teimum í Suðuroynni, sum vit hava verði í samband við og stór semja er millum báðar oyggjarnar, at saman standa vit sterkari, verður sagt í tíðindaskrivi frá fyrireikandi nevndini.

- Í Sandoynni er onki vinnufelag og eingin felagskommuna, sum til dømis í Vágunum. Tí hava tey politisku vælfeløgini tikið stig til hetta, og halda vit at hetta hevur verið eitt fruktargott samstarv. Kommunurnar í Sandoynni eru kunnaðar um fundin. Og tær eru positivar og vilja uttan himpr stuðla okkum í hesum arbeiði, sigur nevndin, ið eisini hevur sett upp skrá fyri fundin.

## Fyrimunir við undirsjóvartunli:

- Fáa betri samband fyri